# Rúna nýggjur leiðari í Javna

**Mánadagin verður leiðaraskifti í Javna. Tá leggur Anna Háberg frá sær eftir tvey ár sum leiðari, og Rúna Sivertsen tekur við**

LEIÐARASKIFTI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Mánadagin tekur Rúna Sivertsen við sum dagliru leiðari í Javna.

Anna Háberg, sum hevur verið dagligur leiðari í felagsskapinum síðani í apríl 2007, hevur valt at siga starvið frá sær, fyri at fara aftur í sítt gamla starv sum fangavørður.

- Hetta hevur verið eitt ótrúliga mennandi starv. Tú møtir einari rúgvu av ótrúligum menniskjum. Her er ógvuliga nógv at tríva í, og tú verður ongatíð liðug, heldur ikki, tá tú kemur til hús, sigur Anna Háberg.

Har er nógv at taka sær av í starvinum sum dagligur leiðari. Eitt nú hevur Anna Háberg nýtt nógva tíð og orku upp á eitt mál sum Børkugøtu, har húsini vóru í so ringum standi, at vindeygu ikki fingust upp.

- Men tað er eisini ein rúgva av persónligum málum at taka sær av, sigur Anna Háberg.

MBF er paraply-organisatiónin hjá nógvum feløgum í Føroyum, sum umboða fólk við ymsum brekum, og Anna Háberg vildi ynskt, at hóast hesi feløg standa væl saman, at teirra samanhald gjørdist sjónligari, so tey kundu staðið enn sterkari.

- Fyri at siga tað stutt, so hevur Javni til endamáls at betra um korini hjá teimum menningartarnaðu og teirra avvarandi, og eitt, sum er alneyðugt at fáa broytt, er verjulógin hjá teimum menningartarnaðu, tí tá tey gerast myndug, enda tey í einum ongamannalandi, har foreldrini onga ávirkan hava meiri, meðan tey menningartarnaðu sjálvi ikki í øllum førum sjálvi eru før fyri, at taka neyðugar avgerðir, sigur Anna Háberg.

## Byrjar mánadagin

Tað verður sum nevnt Rúna Sivertsen, sum tekur við sum nýggjur leiðari í Javna, og hennara arbeiðsdagur hjá felagsskapinum byrjar mánadagin.

Men longu í gjár var nýggi leiðarin á fundi við Rósu Samuelsen, umboðandi Javna.

- Tað verða nógvar og ymiskar uppgávur at taka sær av, og eg rokni við, at tað eisini fer at hava eina ávirkan á starvið, hvussu persónligu eginleikarnir hjá leiðaranum eru, sigur Rúna Sivertsen.

Av uppgávum kunnu nevnast týdningurin av at vísa andlitið hjá felagsskapinum úteftir, at útvega hættir at vinna felagsskapinum pening og at skipa fyri ymiskum tiltøkum, sum kunnu varpa ljós á korini hjá teimum menningartarnaðu.

- Umframt nevndina hevur Javni eisini fleiri økisfeløg, sum eg komi at samskifta við, sigur Rúna Sivertsen.

Hon kemur frá einum starvi sum parttíðar skrivari hjá Sjálvstýrisflokkinum, umframt at hon hevur gjørt nógv við arbeiðið sum sjálvboðin hjálpari hjá ABC-barnahjálpar felagsskapinum, har hon millum annað var við í Liberia fyrr í ár.

Starvið sum dagligur leiðari er eitt fulltíðarstarv, og Rúna Sivertsen tekur sum nevnt við hesum starvi mánadagin.



*Rúna Sivertsen (til vinstru) er nýggjur dagligur leiðari í Javna. Her avmyndað saman við formanninum í nevndini, Óla Wolles, og fráfarandi leiðaranum, Annu Háberg*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Volvo S40 til sølu

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin við 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 33.000 km. Hevur ljósagrá leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alupanelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. bakkspegl v/kumpass, klimaanlegg, innbygd barnasetur aftan o.m.a. Í sera góðum standi. Hevur bert havt 1 eigara. Bilurin verður nú seldur bíliga.

**Áhugaði kunnu ringja 21 19 96 ella senda ein t-post til kho@post.olivant.fo**




## P/F Vága Floghavn hevur frá juli 2008 tikið við virkseminum hjá Vága Floghavn haðani eini 220.000 ferðafólk árliga ferðast til og úr Føroyum.

Útbyggingar skulu fremjast av flogvøllinum og farstøðini eins og virksemið hjá floghavnini skal rekast á handisligum grundarlagi. Ein spennandi tíð stendur fyri framman. Flogvøllurin verður longdur, og farstøðin skal útbyggjast.

Søkt verður tí eftir projektsamskipara til P/F Vága Floghavn. Projektsamskiparin skal í samstarvi við leiðslu felagsins hava ábyrgdina av:

- at ábyrgdin hjá Vága Floghavn sum byggiharra verður hildin og uppgávurnar loystar stundisliga
- at samskipa nógvu ymisku áhugamálini í sambandi við útbyggingina, so arbeiðið ótarnað kann ganga sína gongd, har í millum at tryggja at neyðugar avtalur og loyvi eru tøk so hvørt, sum tørvur er á teimum
- saman við ráðgevum, arbeiðstakarum og veitarum annars støðugt at virka fyri, at bestu loysnir viðvíkjandi góðsku, tíð og kostnaði verða nýttar
- regluligari rapportering til leiðsluna um gongdina
- øðrum uppgávum í sambandi við virksemið hjá Vága Floghavn

**FØRLEIKAKRØV**
Tann rætti umsøkjarin
- hevur útbúgving sum verkfrøðingur ella aðra hóskandi útbúgving
- hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur royndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum innan samskipan, planlegging og leiðslu av húsabygging og annlegsarbeiði, fegin frá byggiharrasíðuni
- hevur kunnleika til føroyskt, danskt og enskt mál

**LØN OG SETANARTREYTIR**
Miðað verður ímóti at seta starvið 1. mars 2009, ella eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 354400 ella teldupost drh@floghavn.fo

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. februar 2009. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

Dávid Reinert Hansen,
P/F Vága Floghavn
380 Sørvágur

Ella við neyðugum fylgiskjølum til teldupost drh@floghavn.fo